SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

NØVN

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Føroyakvøld í Dali



*Vilhelmina Larsen greiður frá um ullaarbeiði, ímeðan tvær dalskonur binda bul*

**Í summar hevur Kunningarstovan á Sandi skipað fyri sonevndum Føroyakvøldum í Dali, har bygdarfólkið sýnir fram gamla føroyska mentan**

MENTAN
*Myndir: Ole Kristian Valle*

Kunningarstovan á Sandi hevur í summar skipað fyri sonevndum Føroyakvøldum í bygdarhúsinum Eiriksgarði í Dali, har sýnd verður fram gomul føroysk mentan. Tað er Vilhelmina Larsen í Dali, sum saman við bygdafólkunum skipar fyri sjálvari kvøldsetuni.

Endamálið við hesum kvøldum er at sýna fram - serliga fyri útlendskum ferðafólkum – hvussu vit livdu í Føroyum fyrr í tíðini. Bygdarfólkið tillagar kvøldseturnar til tey, ið koma.

Tey karða, nappa ull, binda bul og mangt annað. Meðan arbeitt verður, verður sagt frá søgu, søgnum ella ævintýrum og sungin verður onkur miðaldarvísa ella skjaldur.

Jóannes í Dali plagar at spæla urgu ella harmoniku til kvøldseturnar, men hetta kvøldið var hann burturstaddur, og Vilhelmina spældi tí á harmonikunu.

Eisini verða gomul føroysk spøl spæld saman við børnum og ungum í bygdini. Til seinast plaga tey at fara uppá gólv við góðum kvøðarum úr Dali. Borðreitt verður eisini við føroyskum mati.

Hesi kvøldini eru sera hugnalig, og útlendsku ferðafólkini fáa eina heilt serliga uppliving. Kvøldini kunnu eisini nýtast til føroyingar t.d. ung fólk, skúlabólkar, sum ikki vita nakað serligt um ullaarbeiði, verður sagt frá Kunningarstovuni á Sandi.



*Hilmar Larsen í Dali greiður frá, hvussu ein spinnur ullina til tógv*



*Ferðafólkið roynir tann føroyska matin…*



*Vilhelmina Larsen spælir uppá harmonikuna*